## Lydia í Miðluni

Klaksvíkingar hava veruliga tikið tráðin upp eftir havnarfólki, móttøkan Miðlan er eins og Snarskivan í Havn ein vælumtóktur listaskáli. Eisini henda mánaðin er lista á skránni. Hesaferð er tað. Lydia Petersen, ið sýnir fram málningar í Miðlan. Lydia hevur fingist við akvarellmáling, klippmyndir og náttúrumyndir. Málningarnir hon sýnir fram í Miðlan eru akrylmálningar og eitt vet meira abstraktir.



## Miðvingar laða hjall

Um vikuskiftið fóru menn undir at laga ein søguliga hjall uppaftur, skrivar midvagur.fo. Hjallurin, ið verður róptur Stórihjallur ella Nótahjallurin, er ogn hjá Nótafelagnum við Kirkjar, og ætlanin er, at hjallurin nú skal nú fáast í so nær sum upprunastand aftur. Hetta er sambært midvagur. fo ein søguligur hjallur, sum upprunaliga hoyrdi til prestagarðin í Jansagerði.

# Til fiskikapping í Onglandi

**Komandi viku fara tríggir føroyingar og ein dani at luttaka í einari stórari fiskikapping, sum verður hildin út fyri Weymouth í Onglandi**

FISKIKAPPING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í vikuni fara Heini Weihe og Charles Jacob Olsen til Onglands at taka lut í einari fiskikapping uttan fyri býin Weymouth í Suðuronglandi. Magni Blástein er longu farin niður at kanna umstøðurnar, og aftrat sær fáa teir tríggir føroyingarnir ein dana, tí skulu teir luttaka sum lið er neyðugt við fýra luttakarum.

Heini Weihe sigur við Sosialin, at hetta er fyrsta ferðin, at teir luttaka í slíkari kapping, og til tess at sleppa at luttaka, máttu teir verða limir í einum góðkendum fiskifelag.

- Vit hava tí melda okkum inn í Dansk Havfisker Forening, men vit hava annars stovnað okkara egna felag í Føroyum, og tað fara vit at royna at fáa góðkent, meðan vit eru niðri í Onglandi, sigur Heini Weihe.



*Heini Weihe og Charles Jacob Olsen skulu saman við Magna Blástein og einum dana manna føroyska liðið Team Formula*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað er annars sum skilst Magni Blástein, sum er primus motor í ætlanunum at taka lut í hesi kappingini.

Hann var við í teirri kappingini, sum Smyril Line skipar fyri, og har kom hann so í samband við menn, sum hava áhuga fyri hesum frítíðarítrivi, og gjøgnum hesar og umvegis alnetið hevur Magni so funnið fram til hesa kappingina í Weymouth.

Heini Weihe sigur, at teir longu fyri einum ári síðani byrjaðu at leggja ætlanir um hesa kappingina, so hetta er ikki nakað, sum knappliga hevur stungist upp á teir tríggjar. Og hóast ein dani so verður við á liðnum, og sjálvt um tað er ígjøgnum eitt danskt felag, at teir luttaka, so verður tað kortini sum eitt føroyskt lið.

### Fleiri disiplinir

Kappingin byrjar mánadagin 10. september og heldur fram til fríggjadagin, tá seinasti kappingardagur er.

- Kappast verður í fleiri ymiskum disiplinum. Lutur verður kastaður um, hvør verður á hvørjum báti, og tað er longu farið fram. Tað er ikki soleiðis, at føroyingarnir verða saman á einum báti, eg haldi tað er bert tann eina dagin, at tveir okkara verða á sama báti, sigur Heini Weihe.

Annars eru bátarnir soleiðis í støðd, at millum fýra og tíggju mans eru umborð á hvørjum báti. Skiparin virkar samstundis sum dómari, og kappast verður í ymiskum »greinum« teir ymsu dagarnar.

Fiskað verður við tráðu, og tað er bert loyvt at hava tveir húkar, tað vil siga antin ein vanligan pilk ella tveir stakar húkar. Verður eitthvørt knýtt í omanfyri vanliga húkin, verður hetta eisini at rokna sum húkur,

Kappingin er rættiliga væl vitjað, og roknað verður við einum 200 luttakarum ymsastaðni frá. Kappast verður bæði millum lið og millum einstaklingar. Fiskasløgini eru eisini ymisk og telja eisini ymiskt, tá lagt verður saman.

Heini Weihe sigur, at kappingin endar við einari gallaveitslu leygarkvøldið, har vinnararnir fáa steyp og heiðursmerki handað.

Formula.fo og Faroe Travel stuðla ferðini.

# Útleigan av egnum bústaði skattafrí

**Nú fyrsta uppskotið í nýggja bústaðarpakkanum hjá landsstýrinum verður lagt fram mælir Óli Breckmann til, at inntøkur frá útleigan av egnum bústaði verða skattafríar**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað skal løna seg hjá fólki at leiga út egnan bústað. Og tað ger tað ikki í løtuni.

Við risahøga skattinum á inntøkum, ið stava frá útleigan, velja fólk ikki at leiga út – ella í ringasta føri at leiga út svart.

Tað sigur Óli Breckmann ið mælir til, heilt at strika skattin av leiguinntøkum av egnum bústaði, ella í øðrum lagi at seta hann niður svarandi til partafelagsskattin á 18%.

- Hetta hevði ført við sær, at fólk vórðu meiri áhugað í at leiga út, samstundis sum fólk, sum ynskja at leiga, fáa betri og bíligari íbúðir, og hartil eisini fleiri at velja ímillum, sigur Óli Breckmann.

Gerst útboðið størri, verður talan um keyparans marknað við fleiri, betri og bíligari íbúðum, og ikki sum nú, einum avmarkaðum útboði, við hvørt til ivasama góðsku.

- Men hetta skal bert umfata privata útleigan av egnum íbúðum til privat. Handilslig útleigan er í flestu førum umfatað av partafelagsskattinum kortini. Men tað, sum ræður um, er at fáa fleiri áhugað í at leiga út, tí tað gagnar øllum pørtum, heldur Óli Breckmann úr Fólkaflokkinum.



*Óli Breckmann mælir til at strika skatting av inntøkum frá útleigan av egnum bústøðum*